# STRATEGISKJAL FYRI SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLA FØROYA - SRFS

## INNGANGUR

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya var settur á stovn 1. februar 1960. Útbúgvingin til sjúkrasystir var donsk við grundarlagi í danskari lóg og fyriskipan. Námskipanir vóru skrivaðar á donskum og sendar til Danmarkar at vera góðkendar av danska Heilsustýrinum, sum eisini løggildi sjúkrasystrar útbúnar á Sjúkrasystraskúla Føroya.

Skúlin fylgdi tí natúrliga við teimum broytingum, sum vóru gjørdar í Danmark í 1979 og í 1990. Sjúkrasystrar vóru útbúnar í Føroyum áðrenn 1960. Útbúgvingin hevur verið í Føroyum síðani áleið 1910, tá ið tvær danskar diakonissur komu til Føroya.
Útbúgvingin er í dag grundað á føroyska lóg og kunngerð. Í samband við at skúlamál varð yvirtiki økið í Føroyum og broytingar skuldu fara fram í útbúgvingini, varð farið undir at smíða lóg og kunngerð um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum. Politiskur vilji var fyri at leingja føroysku útbúgvingina við 3 mánaðum til 4 ár, sum hon eisini var í Íslandi. Føroyska útbúgvingin gevur heitið Bachelor í sjúkrarøktarfrøði, Bachelor of Science in Nursing. Fyrsti flokkur eftir nýggju útbúgvingini var tikin inn 1. februar 2003, og 4 flokkar hava higartil lokið útbúgving eftir føroyskari útbúgvingarskipan.
Skúlin skifti navn frá Sjúkrasystraskúli Føroya til Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya. Og sjúkrasystrar valdu at skifta heitið frá sjúkrasystir til sjúkrarøktarfrøðing. 1. august í 2008 var Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya formelt lagdur saman við Fróðskaparsetur Føroya.
Enn verða sjúkrarøktarfrøðingar, sum eru útbúnir í Føroyum, løggildir av danska Heilsustýrinum. Heilsumál eru ikki yvirtikið málsøki. Útbúgvingin er skipað í ástøði- og kliniskan útbúgvingarpart, soleiðis at 150 ECTS-stig eru ástøði og 90 ECTS-stig klinikk. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin og harvið útbúgvingin er undir MMR, sum hevur evstu ábyrgd av útbúgvingini, men 1½ ár av útbúgvingini eru undir Heilsumálaráðnum og Almannaráðnum.

## VISJÓN

SRFS skal bjóða út útbúgving til sjúkrarøktarfrøðing á hægsta altjóða støði. Útbúgvingin skal vera opin og dynamisk og grundað á nýggjastu vitan um sjúkrarøkt. Karmarnir fyri at nema sær yrkisførleika skulu vera grundaðir á mennandi og dynamiskt samstarv millum SRFS og kliniska útbúgvingarpartin. Útbúgvingin skal vera granskingargrundað, og kveikjandi granskingarumhvørvi skal skapast í samstarvi við klinikkina, útlendskar granskarar í sjúkrarøkt og aðrar deildir á Setrinum. SRFS skal bjóða lesandi eitt engagerandi og attraktivt lestrarumhvørvi. SRFS skal skipa fyri einum mennadi umhvørvi fyri sjúkrarøktarfrøðingar, sum ynskja førleikamenning, í tráð við tankarnar í Lívs Long Læring.

## MISJÓN

Útbúgvingarnar skulu skipast í tráð við altjóða standardir, te ma sambært Bologna ásetingar um ECTS-stig og transparentar lýsingar av útbúgvingini í skeiðslýsingum, har stigið er týðiligt. Við jøvnum dagføringum av innihaldi, skipan og stigi verður tryggað, at útbúgvingin er í tráð við skjótu vitansmenningina. Eisini læringshættir skulu javnan eftirmetast og mennast í mun til nýggjastu námsfrøðiligu vitan. Samstarvið við kliniska útbúgvingarpartin um menning av útbúgvingini er skipað við støði í eftirmeting, og fundir verða hildnir við jøvnum millumbili. SRFS skipar fyri ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði, so leingi, sum tørvur er á hesum. Eisini skipar SRFS fyri eftirútbúgving, skeiðum á diplomstigi, sum er við til at menna støði á sjúkrarøktini í Føroyum. SRFS skal samstarva við Setrið og onnur universitet um menning av granskingarførleika hjá vísindastarvsfólkinum, eins og átøk skulu gerast fyri at menna netverk og samstarv um gransking í sjúkrarøkt.

## ÚTBÚGVING

ÚTBÚGVINGARTILBOÐ

Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing, BSc in Nursing er 240 ECTS stig, 150 í ástøði og 90 í klinik. Hon hevur higartil verið býtt í lestrarhálvur á 30 Ects stig, men frá 1. september 2010 verður hon løgd tilrættis í modulum/eindum á 15 ECTS stig. Ein eind kann skipast við einum ella fleiri skeiðum. Skeiðlýsingarnar fylgja SOLO. Tilrættisleggingin er byrjað várið 2010. Eindirnar eru bygdar á ymisku sjúkrarøktarøkini, við neyvari lýsing av ávísu kjarnuumráðnum í sjúkrarøktini. Saman við menningini av útbúgvingini er verður samstundis arbeitt við uppskoti til broyting av kunngerðum.

Ískoytisútbúgving í sjúkrarøktarfrøði, 30 ECTS stig yvir eitt ár. Hon er býtt í 3 eindir, sum eru 1) grunnleggjandi obligatorisk eind, sum er á 6 ECTS-stig, 2) valfríð eind á 9 ECTS-stig og 3)bachelor eind á 15 ECTS-stig.
Útbúgvingin, kunngerð og lestrarskipan er ment til at umfata uppstiging av øðrum enn sjúkrarøktarfrøðingum, Td. lærarar, námsfrøðingar og møguligar aðrar yrkisútbúgvingar. Grundarlag er lagt fyri tvørfakligum ískoytisútbúgvingum á Setrinum

Klinisk vegleiðaraútbúgving, 9 ECTS-stig yvir 8 mánaðar, er ein námsfrøðilig útbúgving til sjúkrarøktarfrøðingar og onnur heilsustarvsfólk, sum hava lesandi í klinikk/praktikk
Útbúgvingin, kunngerð og lestrarskipan er ment til at umfata lærarar, námsfrøðingar og møguligar aðrar yrkisútbúgvingar. Grundarlag er lagt fyri tvørfakligum vegleiðara útbúgvingum á Setrinum

Eftirútbúgvingar og onnur skeið á diplomstigi, m.a. í valfría partinum í ískoytisútbúgvingini á 9 ECTS stig, t.d. gerontologi, patientologi, psykiatrisk sjúkrarøkt og námsfrøði í heilsufakum. Skeiðini verða bjóðað út, soleiðis at onnur eisini kunnu fylgja skeiðnum.
Eisini skipar skúlin fyri temadøgum fyri kliniskar vegleiðarar

Masterútbúgvingar
Enn er ongin Master í sjúkrarøkt. Ætlanin er at fara undir hetta tiltak, tá ið lærarahópurin er betri fyri í mun til granskaraútbúgving, soleiðis at vit hava vísindastarvsfólk, sum eru lektaramett. Vegurin verður ov langur, um vit bert skulu dúva uppá føroyska kompetencu, tí verður eisini arbeitt við at etablera netverk og samstarv við onnur universitet.
Í framtíðini fer eisini at vera møguligt at taka samansettar masterútbúgvingar a Setrinum og í samstarvi við onnur universitet.
Ein tvørfaklig masterútbúgving kundi td verið sjúkrarøkt + jura = sjúklingaráðgevi.

GÓÐSKUTRYGGING
Ein triðingur, svarandi til 80 ECTS-stig, av allari útbúgvingini verður mettur við uttanhýsis próvtøku. 60 ECTS-stig (av 90 ECTS-stigum) verða mett í innanhýsis royndum í kliniska útbúgvingarpartinum. Harumframt eru fleiri innanhýsis próvtøkur, sum skulu standast fyri, at lesandi kann fara til uttanhýsis próvtøkur. Próvdómarirnir eru góðkendir av MMR.
Øll útbúgvingin er neyvt lýst í ECTS-stigum, við pensumásetingum, faklýsingum og lestrarætlanum fyri hvørja lestrarhálvu sær. Í kliniska útbúgvingarpartinum hava lesandi skjalaskjáttu (portfolio), við neyvt lýstum málum fyri hvørt kliniska tíðarskeiðið sær, sum lesandi skal standa.
Uppskot til nýggjar reglur og mannagongdur viðv. próvtøkum eru skrivaðar. Tær skulu tillagast komandi kunngerð, áðrenn tær kunnu setast í verk.

LESTRARVEGLEIÐING
Lestrarvegleiðarin er settur fulla tíð. Umframt at vera lestrarvegleiðari, er hon eisini altjóða samskipari. Lestravegleiðarin gevur persónliga og individuella lestrarvegleiðing í mun til útbúgvingargongdina. Umframt vegleiðing, skipar lestrarvegleiðiarin fyri skiftislesnaði, hjá lesandi til og frá útbúgvingi, og stendur fyri tí undirvísingin, sum er tengd at at menna lestrarførleika teirra lesandi. Lestrarvegleiðarin samstarvar við útbúgvingarleiðarin um at meta avriksflutning hjá lesandi, sum søkja inn á SRFS.

Á SRFS riggar tað serstakliga væl at hava hesar funktiónir knýttar at einum persóni

UMSÓKNARTAL / VØKSTUR
22 lesandi verða tikin inn x 1 um árið. Ætlanin er at økja talið til 30 lesandi, so skjótt sum fíggjarjáttanin økist, og lønarjáttanin ger tað møguligt at seta fleiri vísindastarvsfólk.

FRÁFALL
Vit hava tíverri ikki hagtøl fyri fráfalli av lesandi á SRFS, men tølini finnast í skipanini, og ætlanin er at skipa tey fyri flokkarinir, sum eru frá 2003 – 2009. Frá 2010 vænta vit, at nýggja próvbókin á Setrinum eisini er formatterað at taka hagtøl úr. Umframt tølini er ætlanin at hava spurnarblað, sum gevur innlit í, hví lesandi gevast ella flyta útbúgvingarstovn.

Fráfall av sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum væntast at vera hægri enn tilgongdin av lesandi longu í 2020 við verandi gongd. Hetta er eitt álvarsmál fyri føroyska heilsuverki, sum SRFS eisini tekur alvorliga, og áhaldandi vil arbeiða fyri at fáa møguleikar at taka fleiri lesandi inn umframt at bjóða førleikamennandi skeið fyri sjúkrarøktarfrøðingar.
Arbeitt verður við at fokusera PR fyri útbúgvingina. Vit samstarva við lestrarvegleiðarar á miðnámsútbúgvingunum og luttaka á tiltakinum Markleys útbúgving.

TVØRFAKLIG SAMSTARV (INNANSETURS)
Við komandi broyting í útbúgvingini fær Setrið somu skipan við modulum. Væntandi fer tað í framtíðini at gera tað lagaligari at skipa fyri tvørfakligum skeiðum. Samstarv um undirvísing uppá tvørs av megindeildum hevur somuleiðis møguleikar fyri menning. Sum er, undirvísa

SAMSTARV VIÐ KLINISKA ÚTBÚGVINGARPARTIN
Útbúgving fer fram í primeru og sekunderu heilsutænastuni. Útbúgvingarleiðarin er samskipari av klin. plássunum og samstarvar við lærarar og klinisku útbúgvingarplássini. Arbeitt hvur leingi verið fyri at fáa tveir samskiparar settir í klinikkini, ein í Nærverkinum og ein fyri sjúkrahúsini. Av tí at treytirnar í klinikkini ikki eru tær somu, sum ma. danska útbúgvingin hevur, er neyðugt hjá lærarunum á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum at leggja meira arbeiði í samstarvi, enn donsku lærararnir hava- uttan at vit hava fingið fleiri lærarar av tí grund. SRFS fer í 2010 at streingja at fáa eina loysn á hesum viðurskiftum.
Í vár verður skipað fyri fundum í samband við umlegging av útbúgvingini. Ein stýrisbólkur verður settur at fylgja við í broytingini, sum eisini hevur umboð frá klinikkini. Umframt at geva sítt íkast – serliga til kliniska partin av útbúgvingini, so skulu tær eisni samstarva um at menna skjalaskjáttuna í mun til modulútbúgvingina.

ALTJÓÐA SAMSTARV
SRFS hevur langa tradítión fyri altjóða samstarv, sum vit fara halda fast í og menna. Serliga fara vit í størri mun at brúka møguleikarnar fyri lærarаútveksling, bæði fyri at lærarir á SRFS kunnu nema sær vitan um útbúgvingar í øðrum londum, og at fáa útlendskar lærarir hendanvegin
<u>Danmark</u>
Framhaldandi samstarv í Sygeplejerske uddannelsens lederforsamling. Lesandi kunnu gjøgnum avtalu her søkja um skiftislesnað í Teilandi og Australia
<u>Norðurlond</u>
Framhaldandi samstarv gjøgnum Nordplus (Nordkvist) og Euronord, bæði fyri lesandi og lærarar.
<u>Globalt</u>
SRFS fer at søkja um limaskap í GANES (Global Allience on Nursing Education and Scholarship) í 2010.

SAMSTARV MILLUM LESANDI OG SRFS

Lestrarumhvørvi

Lesandi eru skipaði í Ráð teirra lesandi. Samstarvsnevndin á SRFS við limum úr Ráð teirra lesandi og rektaranum og lestarvegleiðaranum hevur ikki virkað í gott ár. Avtalað er at gera enn eina roynd í ár, men fyrst skulu lesandi viðgera, hvussu tey fáa hug og engagement at vera við hesum arbeiði. SRFS arbeiðir við at skipa soleiðis fyri, at lesandi kunnu fáa ECTS tilluting fyri ráðsarbeiði og td menningararbeiðið við at menna útbúgvingina (limir í Styrisbólkinum fyri modulbygdu útbúgvingini).

Lesandi á SRFS hava atgongd til hølini á Jonas Broncksgøtu 25, teldur og print, aftaná at skúlin er stongdur. Tey lata depositum fyri lykil, sum skal latast inn aftaná hvørt lestrarhálvár.

Samskifti við lesandi og lesandi teirra millum kannfara fram á First Class. Øll lesandi eru stovnaði í stevnum, sum geva atgongd til undirvísingartlifar, skema, uppgávur osfr.
Skemalagdir samstarvsfundir ímillum flokkarnar og lærararnar fyri at lesandi kunnu hava ávirkan á útbúgvingina.

Lesandi skulu hava atgongd til at luttaka í granskingarverkætlanum, sum fara fram á SRFS.

**GRANSKING og MENNING**

Avgerandi fyri framhaldandi menning av SRFS er, at skipað verður fyri formaliseraðari menning av granskingarførleika hjá lærarunum. Hetta má gerast í samstarv við onnur universitet og Setrið. Eyðvitað fara allir lærarir ikki undir førleikamenning á Phd-stigi undir einum. Leiðslan á SRFS hevur lagt sum fyrsta stig at skapa rúm og tíð í útbúgvingini við at broyta lestrarskipan, toymis- og uppgávubýti, nú modulútbúgvingin byrjar í heyst.
Í samstarvi við Setrið hava vit og ætla okkum framyvir at

- skipa fyri skeiðum fyri lærarar á SRSF, sum eru fyrireikandi til at fara undir víðari lesnað.
- etablera formelt samstarv við FPF í Syd Dansk Universitet um fyrireikandi skeið til PhD útb

Leiðslan arbeiðir saman við lærarunum at menna eitt stuðlandi umhvørvi, soleiðis at lærarir kunnu fara undir smærri persónlig projekt og verkætlanir saman við øðrum.

Orða stevnuskrá fyri granskingarøkir í sjúkrarøkt verður gjørd útfrá eini menningarætlan fyri SRFS, sum tekur atlit til samfelagstørvin fyri ávísu økini. Eitt nú er gransking innan eldraøkið átrokandi fyri at menna vitan um støðuna í Føroyum.

Ætlan

Orðað ætlan fyri menningina av gransking á SRFS verður lagt fyri leiðsluna á Setrinum og Stýrið í vár, har upplegg um adjunkt/lektarastruktur á SRFS og áramál fyri skiftistíð verður at taka støðu til.

**ORGANISATIÓN**

LEIÐSLA

Fyri at kunna gjøgnumføra stóru broytingarnar, bæði í bygnaði og í útbúgvingini er neyðugt at leiðslan á SRFS er transparent. Bæði lesandi og lærarir skulu takast við í arbeiði og kunnast javnan um tey átøk, sum vera gjørd. Hetta er við til at tryggja eitt gott, opið og konstruktivt samstarv ml. leiðslu, starvsfólk og lesandi og við tí eitt trygt arbeiðsumhvørvi.
Arbeiðsumhvørvið á SRFS skal vera sunt og mennandi fyri at kunna rekruttera, menna, halda fast við vælkvalifiseraðar granskarar, undirvísarar, adminstrativt- og reingerðarstarvsfólk.
Tað áliggur leiðsluni at dagføra ársætlanir og strategi.

STARVSFÓLKAVIÐURSKIFTI

Setunarviðurskifti

Setanarviðurskifti og faklig viðurskifti fyri vísindastarvsfólk á Setrinum eru sera ymisk. Á SRFS er neyðugt at fáa somu treytir fyri at kunna halda fram í tí menning, sum skal tryggja útbúgvingina og eisini at SRFS verður góðkent í akkrediteringini.
Álitisfólkið fyri vísindastarvsfólkini á SRFS samstarvar við leiðsluna um at fáa hesi viðurskifti lýst.

FYRISITING
Skjalfesting
Skrivstovan skal mennast við digitalari skjalfesting, Info-Organizer, og avgjørt er at fara undir at brúka próvbókina í september 2010, tá ið nýggja útbúgvingin byrjar.
Í samband við samanleggingina er farið undir menning av skrivstovufólki í mun til búðskap, web-arbeiðið og fyrisiting eftir avtalu við Setrið og KT-setur. Skipað verður fyri implementering av skipanunum eftir avtalu við Setrið og KT-setur, sum eisini umfatar skeið fyri brúkarar.
KT-Trygd
Kt-politikkur SRFS's skal dagførast, nú broytingar eru gjørdar og samstarv er gjørt við KT-Setur. Á SRFS halda vit fast um at KT-politikkurin skal vera góðkendur av Dátueftirlitinum.
Málsviðgerð
Bæði starvsfólk og lesandi skulu skulu hava skjóta og góða viðgerð. Í samstarvi við Setursskrivstovuna verða nýggjar leiðreglur og mannagongdir gjørdar at tryggja málsviðgerðini.

**BÚSKAPUR**
SRFS er nú samanlagdur við Setrið. Í samstarv við fíggjarleiðaran fara vit at menna innanvirkis búskaparskipan. Arbeiði við fíggjarætlanini verður ment, soleiðis at árliga umsóknin um játtan á fíggjarlógini týðiliga vísir raðfestar útreiðslur eftir kjarnuumráðunum útbúgving og gransking. Hetta skal vera við til at tryggja útbúgvingina.
Aðrar inntøkur
Skeiðvirksemi og eftirútbúgvingar koma undir inntøkufíggja virksemi.
Seta nevnd á SRFS at varða av umráðnum at søkja stuðul aðrastaðni í samband við gransking.
Fund-raising